**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1108.**
**Tíðarskeið: 23/03-30/03 - 2011**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Petur Steingrund, Regin Kristiansen og Jens Arni Thomassen.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldu vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa.

**Eyka uppgáva:** Tríggjar støðir vestan fyri Suðuroy lógu eftir frá túri 1106, tær vóru tiknar fyrsta dagin. Tvey hál vórðu tikin við pelagiska trolinum; annað gav einki, meðan í hinum hálinum vóru 96 smáir makrelar og eitt rognkelsi. Fjaðraklipp av gulllaksi vórðu tikin til genetiskar kanningar. Nakrir toskar vórðu seldir til matstovuvinnuna í Havn. Magnetmerkir, sum høvdu verið á trolinum á túri 1104, 1106 og 1108 vóru avlisin.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m, umframt pelagiska trolið.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini hóskvøldið 24/3 á midnátt. Tóku tvey hál við pelagiska hálinum ávikavist eystan- og vestan fyri Sandoy, og síðani tóku vit tær tríggjar støðirnar, sum lógu eftir frá seinasta túri (1106). Byrjaðu at taka støðir á Føroyabanka leygarmorgunin og kláraðu at taka tilsamans 25 trolstøðir í fýra dagar, tí veðrið var so avbera gott. Harvið lógu fýra djúpar støðir eftir í vestara parti av Føroyabanka. Hydrografistøðir vóru eisini tiknar. Vit landaðu á Toftum mikumorgunin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var nøkulunda eftir ætlan (umleið 400) fyri hýsu, men ikki fyri tosk ella upsa, tí vit fingu ov lítið.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 30. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 20. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Meira var at fáa av toski (2448 kg, 272 stykkir) enn í fjør, sum var eitt tað lakasta árið yvirhøvur. Eisini var eitt sindur meira fingið av hýsu. Hinvegin var nógv minni fingið av gullaksi og svartkjafti. Magakanningarnar vístu, at tað framvegis var lítið til av nebbasild, men tó var nakað av nebbasild at síggja í trolinum á fleiri støðum.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur og magar tikin á túri 1108.

| FISKASLAG | KG Í 25 hálum | Nytrur | Magar | KG í 29 hálum í fjør | Lutfall KG per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| TOSKUR | 2448.03 | 229 | 53 | 1161.53 | 2.44 |
| HÝSA | 1773.21 | 376 | 71 | 1551.75 | 1.33 |
| HAVMÚS | 1093.66 | | | 2942.17 | 0.43 |
| GLÝSUFISKUR | 660.33 | | | 200.89 | 3.81 |
| LOLIGO | 368.04 | | | 851.55 | 0.50 |
| LONGA | 264.80 | | | 134.27 | 2.29 |
| GULLLAKSUR | 257.59 | 96 | | 3859.63 | 0.08 |
| HÁKELLING | 250.00 | | | 0.00 | |
| UPSI | 202.24 | 47 | 22 | 280.73 | 0.84 |
| SKRAMBUL | 102.82 | | | 72.84 | 1.64 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 51.49 | | | 56.93 | 1.05 |
| KNURRHANI | 51.35 | | | 43.54 | 1.37 |
| BROSMA | 46.20 | | | 34.87 | 1.54 |
| SVARTKJAFTUR | 41.35 | | | 442.39 | 0.11 |
| SKØTA | 39.65 | | | 42.91 | 1.07 |
| TUNGA | 18.19 | | | 14.21 | 1.49 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 9.98 | | | 192.71 | 0.06 |
| HAVTASKA | 9.52 | 2 | | 89.92 | 0.12 |
| NAGLASKØTA | 9.25 | | | 0.00 | |
| SANDSPRØKA | 7.88 | | | 11.36 | 0.80 |
| KALVI | 7.36 | | | 80.37 | 0.11 |
| ROSSAMAKRELUR | 5.07 | | | 0.50 | 11.66 |
| REYÐI KNURRHANI | 4.37 | | | 4.49 | 1.13 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 4.23 | | | 1.28 | 3.83 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 4.17 | | | 26.35 | 0.18 |
| NEBBASILD | 4.02 | | | 1.77 | 2.64 |
| GLASKVOYSA | 3.58 | | | 21.48 | 0.19 |
| TRANTKONGAFISKUR | 1.74 | | | 7.89 | 0.26 |
| KLINGRUSKØTA | 0.50 | | | 0.00 | |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 0.04 | | | 0.05 | 1.00 |
| MAKRELUR | 0.04 | 1 | | 0.00 | |
| TILSAMANS | 7733.979 | 751 | 146 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í Tur1108d.doc.

<u>Petur Steingrund</u>